

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 11 - 2011

# Rusland lokkar oljurisar við lágum skatti

Arktiska økið fær størri og størri týdning, nú vónirnar til olju og gass støðugt vaksa. Eitt nú roynir russiska stjórnin at rudda slóð fyri leiting og framleiðslu í hesum stóra men enn lutvíst ókenda økinum við at gera skattaskipanina linari. Nú um dagarnar frættist eisini, at stjórnin hevur gjørt avtalu við finska skipasmiðju at fyrireika bygging av fleiri hundrað skipum, sum eitt nú skulu brúkast til oljuævintýrið í Arktis. Nú boðar so russiski varafíggjarmálaráðharrin, Sergej Sjatalov, sambært Ritzau frá, at Rusland umhugsar at broyta skattaskipanina fyri at fáa oljufeløg at gera íløgur í oljuleiting og framleiðslu í økjunum fyri norðan. Ætlanin er at flyta skattatrýstið á teimum høgu útreiðslunum til oljuboring til havs frá avgjaldi á inntøkum til avgjald á vinning - fyri harvið at skunda undir gongdina í Arktis. Oljufeløgini hava klagað um, at orsakað av teimum lutvíst høgu útreiðslunum at bora í Arktis hava tey minni áhuga í at gera stórar íløgur har, tí avgjøldini raka inntøkurnar heldur enn vinningin. Í august skrivaðu ExxonMobil Corp og Rosneft undir eina avtalu um at leita eftir og framleiða olju og gass í tí russiska partinum av Arktis. Exxon er størsta oljufelagið í USA. Rusland er annars heimsins størsti framleiðari av olju. Fleiri útlendsk oljufeløg so sum Total og Statoil hava sagt seg áhugað í at gera íløgur í russiska partinum av Arktis, men ein fortreyt er, at avgjaldsstøðið verður lækkað. Júst nú bíða feløgini eftir einum útspæli frá skattamyndugleikunum í Ruslandi. Tey eru annars partur av risa gassfundinum Shtockman langt til havs í Arktis. Jarðfrøðiligi kanningarstovnurin í USA upplýsti herfyri, at ein sjeyndapartur av øllum enn fjaldum olju- og gassgoymslum liggja í Arktis. Og nú ísurin minkar verður atgongdin til hesar ovurstóru goymslur nógv lættari.

